# Trygvi trýr upp á tað




*Trygvi Mortensen á síðunilinjuni leygardagin, tá Tjaldur vann sætta sigurin á rað, sum var ímóti Stjørnuni. Uttast vinstrumegin sæst undanmaður hansara, Bogdan Burcea, millum áskoðararnar*

*Mynd: Johnny Lamhauge*

**HONDBÓLTUR** Við seks sigrum í seks dystum hevur Trygvi Mortensen fingið eina dreymabyrjan í síni fyrstu stóru uppgávu sum hondbóltsvenjari, nú hann í hálvanannan mánað hevur verið høvuðsvenjari hjá Sunset-liðnum hjá Tjaldri

Hilmar Jan Hansen

Fríggjakvøldið 12. november sendi Tjaldur út eitt stutt tíðindaskriv, ið greiddi frá, at Bogdan Burcea ikki longur var venjari hjá besta kvinnuliðnum, men at í hansara stað var komin Trygvi Mortensen. Aftur at sær sum hjálparvenjara fekk Trygvi so Damir Oros, sum í fjør sum spælandi venjari fekk menninar hjá Team Klaksvík upp í bestu mansdeildina.

Sum venjari er Trygvi ikki nakað óskrivað blað, men tað er tó frá fótbólti, tey flestu kennast við navnið. Hann hevur síðstu tvey árini verið hjálparvenjari hjá Víkingi, umframt at hann hevur verið venjari og hjálparvenjari hjá eitt nú NSÍ, B68, KÍ, EB/Streymi, umframt at hann í fjørheyst var hjálparvenjari hjá Brian Kerr tveir dystir hjá fótbóltslandsliðnum.

– Nakað av »fiffið« frá fótbólti kann eisini brúkast í hondbólti, og eitt sindur av skili hevur man hóast alt eisini fyri hondbólti, sigur Trygvi, ið heldur ikki er heilt ókendur innan hondbóltin, tí í mong ár var hann dómari í bestu mans- og kvinnudeildunum, umframt at hann á yngri árum eisini hevur spælt hondbólt.

### Glaður fyri Damir

Úrslitini hava í øllum førum lagað seg eftir vild, síðani hann tók við. Sigurin á Stjørnuni leygardagin var tann sætti á rað av seks møguligum, so gongdin hjá Tjaldri er vend munandi henda síðsta hálvanannan mánaðin.

– Eg tók hetta á meg, tí eg sá tað sum eina spennandi avbjóðing. Vit hava eitt superlið, og tað snúði seg bara um at fáa eindina at rigga. Og tað hevur borið til, tí kvinnurnar hava verið óførar. Vit hava koyrt hart á og vunnið hesar fimm dystirnar, so nú koyra vit á, so leingi sum vit klára tað, sigur Trygvi, ið avgjørt ikki sjálvur vil taka allan heiðurin fyri góðu gongdina.

– Ikki má gloymast, at eg havi eina ótrúliga hjálp í Damir, tá tað kemur til tann taktiska partin, og eg haldi eisini, at tað hevur víst seg, at kombinatiónin millum okkum báðar hevur riggað øgiliga væl.

Nú Sunset-kappingin er hálvrunnin, er Tjaldur næstfremst á stigatalvuni, bara eitt stig aftan fyri oddaliðið, Stjørnuna, og ta støðuna er nýggi venjarin hjá Tjaldri sera væl nøgdur við.

– Ja, eg eri avgjørt nøgdur við støðuna, nú jóla- og nýggjárssteðgurin í landskappingini stendur fyri framman, tí tað var málsetningurin hjá okkum, at vit skuldu vinna hesar seks dystirnar og koma upp á síðuna av Stjørnuni. Og tað hava vit nátt higartil, sigur hann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*




*Spælarar og venjari hjá Tjaldri fegnast eftir sigurin leygardagin, samstundis sum vónbrotið lýsir av teimum í Stjørnuni, ið síggjast aftanfyri høgrumegin*

*Mynd: Johnny Lamhauge*

# Verjuspælið gjørdi munin

**HONDBÓLTUR** Leingi var dysturin leygardagin millum Tjaldur og Stjørnuna sera javnur og kundi koppa báðar vegir. Tjaldur hevði tó hug at vera frammanfyri fyri tað mesta, og ímóti endanum gjørdi heimaliðið bart og vann

Hilmar Jan Hansen

Lagt var upp til eitt ordans brak í ítróttarhøllini í Runavík leygardagin, tá Tjaldur tók ímóti Stjørnuni. Hesi bæði liðini hava verið tey bestu seinnu árini, og serliga ráddi um hjá Tjaldri at fáa nakað burturúr, so liðið ikki skuldi detta niðurímillum í oddastríðnum, har Neistin eisini blandar seg væl og virðiliga.

At hesin dysturin fyrst og fremst kom at verða avgjørdur av, hvat av liðunum hevði ta stinnaru verjuna, vísti seg beinanvegin. So væl hildu tey fast, at tá átta minuttir vóru farnir, høvdu tey bara fingið eitt mál í part. Talan var bæði um gott málmansspæl og verjuspæl sum heild, ið forðaði fyri, at mál komu burtur úr dúgligu atsóknunum.

Men síðsta triðingin av fyrra hálvleiki sá Tjaldur út til at fara avstað. Adina Petrea fekk fýra mál á rað, og ta einu løtuna var støðan 11-7 til heimaliðið. Kortini skuldi meira til at koppa Stjørnuni, sum undan steðginum fekk minkað munin niður í eitt mál.

### Meiriluti gav lítið

Seinni hálvleikur helt fram upp á sama máta, men ta einu løtuna sá út til, at Stjørnan fekk fatur í rætta endanum. Í fyrsta lagi sá út til at rigga væl, at Bára Skaale Klakstein mansvarði Adinu, umframt at Tjaldur løtu seinni sá út til at hava tveitt alt fyri borð, tá liðið brádliga fekk tríggjar útvísingar innan fyri ein minutt.

Men kortini fekk Stjørnan ov lítið burturúr meirilutastøðuni. Tað eydnaðist at skorað trý mál, men hóast fámentar, fingu tær hjá Tjaldri vart væl, og ikki minst hjálpti Guðrun í Lágabø væl til, tá hon í málinum hevði serliga tvær meistarligar bjargingar, ið hálvavegna tóku pippið frá klaksvíkskvinnum.

Og tá Tjaldur aftur hevði fulla manning, fall svarið beinanvegin, tí eftir lítlari løtu varð dysturin avgjørdur við trimum málum í tveir minuttir, og Stjørnu-manningin hevði einki hóskandi aftursvar, men royndi við einstaklingaavrikum til fánýtis at fáa vent tapinum til stig.

### Trý lið um boðið

Meginpartin av tíðin var talan sostatt um ein tættan dyst, har verjuspælið hevði nógv at siga. Men eisini í álopsspælinum vísti Tjaldur seg at hava fleiri streingir at spæla uppá, hóast Cornelia Rimbu sat uttanfyri, tí hon hevði fingið reytt kort í dystinum frammanundan.

– Eg haldi, at munurin í dag var tann, at vit góvu tey 10 prosentini eyka, vit høvdu lovað okkum sjálvum áðrenn. Eitt av okkara fokusumráðum var at vinna dystin í verjuni, og tað var eisini í verjuni, at vit vunnu í dag, segði venjarin hjá Tjaldri, Trygvi Mortensen, tá vit hittu hann eftir loknan dyst.

Av tí at Neistin leygardagin vann grannauppgerðina ímóti Kyndli, er kappingin sera tøtt millum trý tey fremstu í Sunset-kappingini, har Stjørnan framvegis er á odda við 20 stigum, men nú bara er eitt stig framman fyri Tjaldur og Neistan, ið av álvara bjóða av.

– Alt bendir á, at tað verða hesi trý liðini – Stjørnan, Tjaldur og Neistin – ið skulu kappast um tey bæði finaluplássini. Hetta verður eitt »close race«, sum onglendingar siga, staðfesti Trygvi Mortensen.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Bara 28 mál

**HONDBÓLTUR** Tað vóru ikki fleiri enn 28 mál skotin, tá VB vann á StÍF

Uni Holm Johannesen

StÍF og VB hava ein lítið virknan leiklut á stigatalvuni í løtuni.

Tað er bara ovastu liðini, sum veruliga hava sítt at stríðast fyri. Hini liðini vóna hinvegin at stjala stig frá Stjørnuni, Tjaldri og Neistanum.

VB fekk tvey stig í skjáttuna fríggjakvøldið. Kvinnurnar úr Vági vitjaðu hjá StÍF, sum er botnlið.

Tað var lítið veiggj í álopsspælinum, og bara 28 mál komu.

VB vann 18-10 og vann seg upp á fjórða plássið í SunSet-deildini.

*uni@sosialurin.fo*